# Bragdið hevur 60 ára stovningardag

**Í morgin kl 16-18 hevur Bragdið móttøku í Miðlahúsinum í sambandið við 60 ára stovningardag felagsins**

HÁTÍÐARHALD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í morgin, mikudagin 17. oktober, eru 60 ár liðin síðan upprunaliga stovningardagin hjá Bragdinum.

- Bragdið er ítróttarfelag fyri frælsa ítrótt í megindøkinum og er eitt av fimm feløgum undir FÍF, sum er sersamband fyri frælsa ítrótt. Bragdið varð stovnað av átta ungum eldsálum úr fimleikafelagnum, og endamálið var at íðka frælsa ítrótt, sigur felagið í tíðindaskriv.

Úr gerðabók felagsins kann lesast, at "Limur kann gerast hvør drongur, ið hevur fylt 14 ár."

Felagið hevur verið meira og minni virkið hesi árini, og okkurt tíðarskeiði hevur einki virksemi verið. Í kjalarvørrinum av Oyggjaleikunum í 1985 varð stig tikið til at endurstovnað felagið í 1987, og er virksemið støðugt vaksið síðani. Nú eru fimm feløg kring landið.

- Bragdið hevur seinastu árini lagt stóran dent á eitt miðvíst ungdómsarbeiði fyri at menna hesa ítróttargrein soleiðis, at tað við framtíðini í huga kunnu skapast úrslit, sum eru á altjóða støði. Vánaligu umstøðurnar higartil, hava tíbetur ikki forðað fyri, at eldsálir í felagnum hava lyft eina stóra uppgávu og ment felagið so mikið, at stór tøk kunnu takast og hetta síggja vit m.a. í stóru afturvendandi tiltøkunum sum Flaggdagsrenningini, Ólavsøkurenningini, TórshavnMarathon, Kvinnurenningini og Fólkaheilsurenningini, umframt fleiri aðrar minni kappingar innan frælsa ítrótt sum heild, sigur felagið.

Nú bragdar við umstøðunum til at íðka frælsa ítrótt, nú eitt stadion verður klárt at taka í nýtslu komandi summar, og felagið stendur tískil við eitt vegamót á sínum 60 ára degi og skal stinga út í kortið og seta sær enn størri mál.

- Felagið takkar øllum, eldsálum í felagnum, einstaklingum og virkjum, sum við sínum stuðil á ein hvønn hátt hava gjørt tað møguligt, at menna felagið, sigur felagið.

Stovningardagurin verður hildin við móttøku í Miðlahúsinum mikudagin kl. 16-18, har øll eru hjartaliga vælkomin og her verður eisini møguleiki fyri at hitta fleiri av stigtakarunum til felagið.



*Í morgin eru liðin 60 ár síðani, at felagið Bragdið varð stovnað. Felagið hevur ikki verið virkið øll árini, men varð endurstovna í kjalarvørrinum av oyggjaleikunum í 1985*

MARKNAÐARRÁK

VIKA 42 2007

### PARTABRØV LÆKKAÐU

Óvissan gjørdi aftur um seg mánadagin, tá stórbankin Citigroup kunngjørdi roknskap ið var verri enn væntað. At stórir bankar eisini eru í samráðingum um at stovna ein trygdargrunn, fær aftur íleggjarar at ivast í um kredittkreppan stingur djúpri enn áður mett. Evropisku partabrøvini lækkaðu somikið mánadagin, at positiva gongdin farnu viku varð etin upp soleiðis at partabrøvini eru lækkaði ½% farnu vikuna. Hóast stóru lækkingina í juli og august mánaða, eru evropisk partabrøv allíkavæl hækkaði sløk 14% seinasta árið. Norðurlond hava staðið seg serliga væl og eru hækkaði heili 26% farna árið. Um hugt verður at hækkingini í vinnugreinum sæst, at serliga rávørufyritøkurnar vinna pening. Hesar eru hækkaðar heili 40% seinasta árið. Men eisini fjarskifti, ídnaður, kunningartøkni og nýtsluvørur hava staðið seg væl og eru hækkaðar góð 20% í Evropa. Ikki óvæntað hevur fíggjarvinnan staðið seg illa í kjalarvørrinum av kreppuni. Tó eru fíggjarpartabrøv hækkað góð 3% seinasta árið.

### BRETSKA PUNDIÐ LÆKKAÐI

Bretska pundið viknaði aftur í farnu viku. Um bretsku brúkaraprísirnir seinni ídag vísa ein vøkstur eins og sethúsavísitalið, so er lítið sannlíkt at bretska rentan verður lækkað sum gitingar hava verið um. Hetta kann fáa pundið at hækka aftur. Dollarin heldur fram at lækka og liggur nú á 5,24. Lækkandi dollarin verður óivað eitt av evnunum á G7 toppfundinum sum verður hildin í vikuskiftinum og niðurstøður frá fundinum kunnu ávirka kursin.

### RENTURNAR ÓBROYTTAR

Renturnar hava verið støðugar á seinastu vikuna og rentan á 10-ára statslánsbrævinum liggur um 4,50%.

### HESA VIKUNA

Úr USA koma hesa vikuna fleiri lyklatøl, sum kunnu fara at mynda gongdina á marknaðunum., til dømis konjunkturbarometrið úr New york og Philadelphia Fed. Úr Evropa verður tyska ZEW vísitalið kunngjørt og mikudagin er samandrátturin frá bretska rentufundinum har orðaskifti um fíggjarófriðin og kreppurakta Nothern Rock Bank verður serliga áhugavert.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1500,56 | + 0,91% |
| Alheims partabrøv | 8728,55 | -0,53% |
| Atlantic Petroleum | 1674,00 | + 6,62% |
| Føroya Banki | 223,00 | -0,22% |
| Eik Banki | 663,00 | + 2% |
| KB Trygg Eurostoxx | 111,12 | + 1,96% |
| USD | 524,60 | -1,10% |
| JPY | 4,47 | -1,09% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

**Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo**

KAUPTHING BANK